

**Harald Anthoniussen:**

# Bjargaður av forlistum skipi tvey ár uppí slag

**Vit halda áfram við frásøgnini, tá ið manningin á Arizonu bjargaði sær, eftir at skipið var farið á ein boða í 1932. Longu árið eftir var Harald aftur út fyri forlissi, tá ið Phi-Phi varð ásigld av Nólsoy og sakk. Hetta spældi eisini væl av. Síðan gjørdist hann trúboðari**



*Hetta er Stranda kirkja, har ognarlutirnir hjá teimum á Arizonu vóru lagdar inn*



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**4. partur**

## Vit koma til Bjarg

Tað var rættiligt seint, tá ið vit komu til bygdina, har vit skuldu gista. Hetta var Bjarg, ein lítil bygd úti móti tí opna havinum, har tað altíð var vindur.

Hóast tað var kalt við vindi og kavaavfalli, vórðu vit møtt av mongum menniskjum, sum bjóðaðu okkum vælkomin. Tað var, sum um vit hoyrdu heima teirra millum. "Kom við heim," søgdu tey, og her møttu vit einum rættuligum blíðskapi.

Tað gekk vist ein hálvur tími, áðrenn vit merktu hita í kroppinum hóast innihita og kókandi heitt kaffi.

Vit høvdu í kikaranum sæð, at skip okkara var skolað uppá land. Hetta vísti seg at vera tætt við nærmastu húsini niðri við strondina í Bjarg. Vit fóru at hyggja at vrakinum. Har var ringt at ganga niðri í fjøruni, har tað var sera hált. Skipið stóð fast á einum kletti, og tað sá nógv verri út enn vit høvdu sæð tað frá bóndagarðinum.

Har var bert ein tómur skrokkur eftir við stórum holum báðumegin. Botnurin á Arizonu var partvíst burtur. Hetta var ein óhugalig sjón, og vit fóru haðani, sum um vit høvdu verið til eina jarðarferð.

## Stranda Kirkja

Á vegnum aftur gekk leiðin til kirkjuna í bygdini, har nakað av tí, sum varð rikið á land av skipinum varð lagt inn á náttini. Allir vaksnir menn í bygdini høvdu verið við til bjargingina. Her lá alt í einum hurlivasa. Í einum koyggjusekki lá ein sálmabók rullað inn í eitt hálsaturriklæði. Sálmabókin kundi framvegis nýtast, og hetta var ein glotti í tí ringa.

Henda kirkjuvitjan hevði verið sera óhugalig. Kirkjan var køld sum í einum kølirúmi. Her var eisini sera skýmligt inni. Einasta ljósglæma kom gjøgnum frystu vindeyguni.

Hetta var Strandakirkja, sum verður roknað fyri at vera ríkasta kirkja í Íslandi vegna allar tær olmussur, sum sjófarandi í havsneyð hava lovað henni. Men tað sá út sum um kirkjan ongan góðan hevur. Hetta er kortini broytt seinni, og er kirkjan nú hugnalig og vøkur.

Her skal verða skoytt uppí, at Stranda Kirkja spældi eisini ein leiklut, tá ið Ernestina fór á land á hesum leiðum í 1930. Níggju mans doyðu. Líkini, sum vórðu bjargað, vóru í fyrsta umfari løgd inn í Stranda Kirkju. Í ár 2000 var skipað fyri eini ferð til staðið, har Ernestina fór á land. Tá varð skipað fyri eini andakt í júst Stranda Kirkju, har avvarðandi bæði hjá teimum, sum bjargaðust og teimum, sum umkomust, vóru hjástødd. Hetta var ein sera kensluborin løta.

## Fingu innivist í Bjarg

Tá ið tað fór at skýma komu vit aftur til okkara vertsfólk.

Í flestu førum búðu vit tveir og tveir í hvørjum húsi. Eg og kokkurin búðu hjá einum ungum hjúnum við einum tvey ára gomlum soni. Húsið var nýbygt, har vit enn kendu roykin av nýggjum timbri. Vit kendu okkum sum heima. Maðurin fiskaði við einum trolara í Reykjavík men hevði nú frí í nakrar dagar. Hann bíðaði eins og vit eftir at sleppast kundi til Reykjavíkar.

"Hetta var ein langur mánadagur," segði mín búfelagi, tá ið vit løgdu okkum seint á kvøldi. Hóast alt, vit høvdu upplivað, svóvu vit uttan støðg til klokkan var sjey næsta morgun.

Áðrenn vit fóru til songar, høvdu vit hoyrt veðurforsøgnina fyri komandi samdøgur. Boðað var frá framhaldandi kavaroki og frosti, so vit kundu ikki rokna við at sleppa víðari komandi dagin. Tí var tað freistandi at verða verandi undir dýnuni til boð komu um morgunkaffi.

Longu tá vit gloppaðu eyguni, var tann lítli komin inn í okkara kamar. Hann vildi fegin tosa við hesar fremmandu menn. Hansara barnamál var ringt at skilja, men at vit skuldi koma upp, skiltu vit væl á hansara geberdum.

"Tað hevur ongan skund," hoyrdu vit eina rødd siga í køkinum, men drongurin gavst kortini ikki. Vit skundaðu okkum í klæðini. Foreldrini høvdu morgunkaffi



*Í 2000 varð skipað fyri ferð til Íslands í samband við, at tað vóru liðin 70 ár, síðan Ernestina fekk somu lagnu sum Arizona. Munurin var tó tann, at við Ernestinu doyðu 9 mans.*
*Skipað varð tá fyri andakt í kirkjuni. Fremst á myndini sita Poulina hjá Ziska saman við synum. Tað var Ziska, sum framdi eitt tað størsta bjargingarbragd í Føroya søgu, tá ið hann svam í land við línu, sum gjørdi tað møguligt at bjarga monnunum, sum eftir vóru*